# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Krevja svar frá løgmanni

Tað var einki minni enn ein bumba, sum varð slept í Tinganesi seinnapartin mánadagin, tá løgmaður uttan nakra ávaring yvirhøvur kunngjørdi, at Tjóðveldi var ikki longur partur av samgonguni. So harður varð bresturin, at hann hoyrdist langt út um landoddarnar, har fjølmiðlarnir nú gera sær dælt av eini fyri Føroyar sera mannminkandi søgu um eina skrivstovu, sum varð orsøkin til samgonguslit.

Hóast løgmaður hevur greitt frá orsøkini til at koyra Tjóðveldi út úr Tinganesi og hóast nógvir upplýsingar eru komnir fram í sokallaða skrivstovumálinum, so standa flestu av okkum spyrjandi: hvat var tað, sum veruliga hendi í hesum málinum, og hví var tað júst tað, sum skuldi fáa bikarið at flóta yvir! Og hví skuldi løgmaður vísa sínum nú fyrrverandi samstarvsflokki so lítla virðing ikki at kunna hann um avgerðina, áðrenn tíðindafundin!

Tað stendur orð móti orði, ikki minst nú umsitingin í Tinganesi hevur valt at geva miðlunum innlit í tilfar, sum snýr seg um "skrivstovumálið", men sum formaðurin í Tjóðveldi síðani lutvíst hevur víst aftur, tí, sum hann sigur, hetta tilfar lýsir ikki allan sannleikan. Og í hesum máli eigur tað sama galda sum í øðrum málum, har fólk verða skuldsett ella ákærd, at soleingi haldgóð prógv ikki eru løgd fram, so eigur ivin at koma tí "skuldsetta" til góðar, áðrenn dómur verður feldur. Seinasta orðið er tí ikki sagt í skrivstovumálinum. Tó er hetta málið - um enn lítið - so kortini so mikið álvarsligt fyri umdømi hjá bæði politikarum, embætisfólki og Tinganesi, at her má alt gravast fram, líka mikið hvør so enn er syndarin ella ábyrgdarin. Sjálvandi fer Tjóðveldi, sum sær seg alvorliga skatt, ikki at lata hetta málið fara í gloymibókini, nú tað kennir seg óvirðiliga og svikaliga viðfarið av løgmanni.

Vit skrivaðu í gjár, at løgmaður hevur ikki nakra góða sak, nú hann brúkti hetta málið til at kappa á stokkinum. Nettupp orð hansara um, at hetta bert var dropin, setur krøv til sama løgmann, sum hevur skyldu til yvirfyri Føroya fólki og eisini teimum hann samstarvaði við at greiða frá, hvørji veruligu málini vórðu, sum gjørdu, at hann loksins beitti Tjóðveldi á dyr. Tí eiga vit ikki bara at fokusera uppá dropan ella toppin á ísfjallinum, men eisini tað, ið løgmaður sipar til varð høvuðsorsøkin til, at henda samgongan ikki kundi halda fram, nevniliga tað, sum hevur fylt bikarið. Var tað so, at tað var baklandið hjá løgmanni og hansara egnu tingfólk, sum ikki longur vildu samstarva við Tjóðveldi, soleiðis sum tað hevur verið frammi síðani bumban brast í Tinganesi, tá varð tað meira mansligt og virðiligt av løgmanni at sagt hetta.

Føroya fólk hevur krav uppá bæði at kenna allan og fulla sannleikan um dropan, sum fekk bikarið at renna yvir, men eisini hvørji mál fyltu bikarið. Bæði løgmaður og fyrrverandi varaløgmaður skylda Føroya fólki hetta.

**Sosialurin**

## Aftursvar til mótmælisskriv frá Føroya Væl

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri í Tórshavnar kommunu



Vegna Føroya Væl hevur Anfinnur Brekkstein í mótmælisskrivi sett fíggjarnevndini hjá Tórshavnar kommunu tríggjar spurningar í sambandi við vísindaliga kanningararbeiði, hví føroyingar flyta av landinum og ikki koma heimaftur.

Spurningarnir snúgva seg um nær fundur hevur verið um hetta mál, og hvør atkvøddi fyri og hvør atkvøddi ímóti, tá málið var fyri.

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi 3. oktober 2007. Ein samdur meiriluti atkvøddi fyri málinum, meðan ein minniluti hevði eina aðra støðu, men atkvøddi tó ikki ímóti tilmælinum. Meirlutin var Jógvan Arge, Leivur Hansen og Heðin Mortensen. Minnilutin var Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen.

Umrødda vísindaliga verkætlan rópast "Kanning yvir føroyingar í Danmark – hvat skal til fyri at fáa tey at flyta heim aftur".

Í avtalu við journalnummari 2008-4011/8 um henda part av kvantitativa vísindaliga arbeiðnum verður sagt, at "Tórshavnar kommuna rindar kostnaðin av spurnarkanningini beinleiðis til Danmarks Statistik, sum er kr 125.000."

Tórshavnar kommuna rindar upphæddina sambært rokning frá Danmarks Statistik, dagfest 29. august 2008. Heitið á rokningini er "telefon-interview med færinger i Danmark i perioden uge 21 til uge 26 i 2008."

Vísindaliga kanningarúrslitið er komið út í bóklingi "Hví føroyingar búseta seg í Danmark". Tórshavnar kommuna metir seg hava fingið nógv burturúr kanningararbeiðinum. Samstundis má ásannast, at uttan hesa hjálp frá Danmarks Statistik, hevði høvuðsstaðarkommunan ikki megnað at fingið umrøddu tøl og dátustovn til vega fyri henda prísin.

## Mótsøgnin í boðunum frá løgmálaráðnum

JOHN S. MYLLHAMAR



Í Kringvarpinum fríggjakvøldið fingu lurtararnir at vita frá løgmálaráðnum, at føroysku kommurnur hava ikki loyvi at lata pening til aðrar kommunur í landinum, tá ið talan er um katastrofuhjálp. Peningurin skal bara brúkast til borgaran í kommununi. Í næsta andadrátti sigur løgmálaráðið, sambart kringvarpið, at kommunurnar við fullum rætti kunnu lata pening til kommunur í Íslands, eitt nú at byggja barnagarðar í bygdum, hvar skalvalop hevur tikið eini tvey hús við sær.

Løgmálaráðið gevur Sands kommunu saman við Leirvíkar og Húsa kommunum boð um, at tær høvdu ikki loyvi at lata nakrar krónur til Skálavíkar kommunu, tá ið hendan var rakt av náttúruskaða, men samstundis boðar løgmálaráðið frá, at kommunurnar eru vælkomnar at lata pening til eysturеuropa, Afrika og Asia.

Áleggur løgmálaráðið so kommununum at fylgja við, at peningurin kemur teimum í tí fjara til góða, ið hann er ætlaður, so at hann ikki endar í hondunum á myndugleikunum í hesum londum, sum í nógvum førum eru stýrd av korruptión?

Ein slík lóg má í oyrunum á mongum ljóða sum idioti. Hon er líka býttislig, sum tann býttlingurin, ið hevur klagað til løgmálaráðið um hasar fáu krónurnar, ið tríggjar kommunur í Føroyum av vælvild hava latið Skálavík, og síðani hevur fingið tað við í tíðindasendingina í kringvarpinum.

Øvund og hatur geva ongum mørkum gætur.

Ein undrast yvir, at kringvarpið ikki setti løgmálaráðnum spurningin um, hví teir hava gjørt eina lóg, ið er so mótsigandi. Áhugavert hevði verið at hoyrt ráðið komið við skilagóðari grundgeving. Kringvarpið kundi eisini spurt viðkomandi, ið hevur klagað, hví hann hevur gjørt sær tann stóra ómak at fara heilt upp í løgmálaráðið við einari so óbetýðiligari søk.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støдd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.